# Drotningin segði bara takk

*Margretha drotning og Heindrikur prinsur vitjaðu annan hvítusunnudag á Kirkju, har tey vóru til deknaguðstænastu í fullsettari kirkju. Og drotningin kendi søguna um jólaskipið, sum gekk burtur at kalla fyri durunum hjá kirkjufólki*







Edvard Joensen
Myndir: Jens K. Vang

-Eg segði: „Værsgo' „, og hon segði bara: „Takk", greiddi fýra ára gamli Sámal Kristiansson frá, tá hann hevði handað drotningini blómutyssi við tyrlupallin á Kirkju annan hvítusunnudag.

Margretha drotning og Heindrikur prinsur komu út á Kirkju við tyrluni hjá Atlantsflog. Mjørkin hekk heldur tungur niðuryvir, og spenningur var til tað seinasta um, hvørt tyrlan mundi fara at flúgva til Fugloyar, ella drotningarhjúnini fóru til Kollafjarðar í kirkju í staðin.

Pressan møtti tíðliga annan hvítusunnumorgun á Bursatanga í Havn og fór við Silju til Fugloyar. Vónað var so bara, at drotningin eisini fór at lenda.

Og tað gjørdi hon. Tíggju minuttir fyri ásetta tíð hoyrdist suðan niður úr skadduni, og tyrlan fór sveimandi inn yvir Hattarvík. Tey fóru á »sightseeing« túr, áðrenn lent varð á Kirkju.

Hans Erik Jacobsen, tyrluskipari, og Terji Jacobsen, stýrimaður, hildu ikki, at tað var so nógv øðrvísi at flúgva við drotningini, enn tað var at flúgva vanliga flúgving. Soleiðis at skilja, at tað varð ikki gjørt nakað meira burtur úr, tí øll flúgving skal røkjast ordiliga.

Men teir noktaðu tó ikki fyri, tá teir vórðu spurdir aftur, at tað var stuttligt at flúgva við slíkum ferðafólki.

Margretha drotning trein úr tyrluni ílætin føroyskan búna, meðan Heindrikur prinsur var í admiralsuniforminum. Lagt varð beinan veg til merkis, at prinsurin hevði ein fingur á høgru hon tilbundnan, og hann heilsaði upp á fólk við vinstru hond. Roynt varð at fregnast um, hvat hent var, men eingin segði seg vita við vissu. Onkur segði seg hava hoyrt, at hann hevði lagt fingurin ímillum, tá hann skuldi lata eitt vindeyga aftur, nú tey vóru á almennari vitjan í Rumenia herfyri. Men tað helt onkur annar vera eitt sindur løgið, tí eingin segði seg hava lagt merkið til nakran skaddan fingur fyrr á vitjanini. Og á myndum, Tíðindablaðið Sosialurin fekk av prinsinum hvítusunnuaftan, sæst týðuliga, at hann heilsar upp á fólk við høgru hond.

Zacharias Zachariassen, bygdarráðsformaður, tók í móti drotningahjúnunum, og fýra ára gamli Sámal Kristiansson, í føroyskum búna, handaði drotningini blómutyssi.

Drotningin fekk handaðan ein málning av Kirkju, sum Hanni Bjartalíð hevur málað. Eisini fekk drotningin nýggju, føroysku koralbókina.

Síðan varð farið heim gjøgnum bygdina, har vitjað varð inni í gamla handlinum á Kirkju. 92 ára gamli Mourits Sørensen, sum eigur húsini, var komin út at vera hjástaddur hesa løtuna.

Inni í stovuni hingu myndir av foreldrum Margrethu drotning, Fríðriki kongi níggjunda og Ingrid drotning á yngri árum. Drotningin fegnaðist um at síggja myndirnar, og Mourits gamli segði, at so leingi hann ráddi, skuldu tær verða hangandi.

Eisini bygdarráðsformaðurin segði, tá tey vóru komin út aftur, at í Fugloy er tað bara ein sjálvfylgja, at myndir av teimum kongaligu eru at síggja.

Eftir stuttan steðg, har ein kaffimunnur varð fingin niðurum, varð farið í kirkju.

Meðan tey vitjaðu í gamla handlinum, varð veðrið batnað munandi. Nú var klárað í, og rættiliga lýtt var eisini, tá klokkan fór at ringja.

Men tað gekk ein løta, frá tí, byrjað varð at ringja, til fylgið kom fram. Klokkarin ringdi við sveittabroti á tí trongliga loftinum, har rættiliga væl av fólki stúgvaði seg saman. Kirkjan var full - og reiðiliga tað - hesa fyrstu ferðina, kongalig vitjan var í Fugloynni.

Hendan dagin, meðan fleiri fremmandir biskupar prædikaðu í nógvum føroyskum kirkjum, hevði drotningin valt at fara til deknaguðstænastu í eini lítlari bygdarkirkju á útoyggj. Og tað var mikið hugnaligt, og drotningin tóktist fegin um at hava verið.

Tann 76 ára gamli eftirlønti lærarin, Hans David Matras, las lestur, sum Jákup Magnussen, fyrrverandi prestur, hevur skrivað til annan hvítusunnudag. Lisið varð á føroyskum, og drotningin fylgdi við á blaðið við danskari umseting. Guðstænastan var stutt, og bara tríggir sálmar, hvítusunnusálmar, vórðu sungnir.

Út aftur komin vóru drotningahjúnini sjónliga hugtikin av tí vakra útsýninum, sum knappliga opinberaðist fyri teimum, nú tað rættiliga klárnaði. Steðgað varð á, meðan greitt varð frá, hvat tað var fyri land, ið sást. Og løgmaður nýtti eisini høvi at vísa á, at har norðuri lá Viðareiði, har hann sjálvur býr.

Heindrikur prinsur fregnaðist um streymviðurskifti í Fugloyarfirði. Hann er kappsiglari og hevur tískil áhuga fyri slíkum viðurskiftum.

Jú, her rak hart, greiddi løgmaður frá. Og so fór hann at greiða frá um jólaskipið. Men her legði drotningin uppí. Hon kendi væl ta søguna, og vildi fegin vera við í tosinum.

Gingið varð síðan út aftur á tyrlupallin, har sagt varð farvæl, og fylgið fór aftur í tyrluna.

Tá drotningin við fylgi var komin í tyrluna at sita, byrjaði mannamúgvan, sum var komin saman, at syngja »Tú alfagra land mítt.« Tyrluskiparin læt rútin upp, og bíðað varð á pallinum, til sungið var liðugt.

Tyrlan lætti sær síðan á og fleyg ein lítlan rundtúr yvir bygdini, meðan fólk stóðu og veittraðu farvæl

Δ.










## Móttøka hjá Kaupthing

Hin 1. mars 2000 varð Kaupthing formliga virkið í Føroyum. Síðan hava Føroya Sparikassi og Kaupthing hf. í felag stovnað felagið Kaupthing Føroyar.

Kaupthing Føroyar bjóðar fram tænastur innan handil og ráðgeving á virðisbrævamarknaðunum.
Ætlanin er eisini at luttaka í uppbyggingini av einum føroyskum virðisbrævamarknaði og við tíðini luttaka í eini væntaðari privatiseringstilgongd í Føroyum.

Áhugin fyri hesum virksemi hevur síðan byrjanina verið sera stórur, og Kaupthing Føroyar er longu nú størsti útbjóðarin av hesum tænastum í Føroyum.

Fyri 14 døgum síðan fluttu vit inn í okkara nýggju høli í bygninginum hjá Sparikassanum við Tinghúsvegin.

Í hesum sambandi bjóða vit øllum áhugaðum til móttøku í nýggju hølum okkara á Tinghúsvegi 14:

**Hósdagin 15. juni kl. 15.00 - 17.00**

KAUPTHING
FØROYAR
Tinghúsvegur 14 • Tórshavn
Tel 351500 • Fax 351501
www.kaupthing.com

SANSIR TEL 355355